# Sparingar raka skeivt

**Feløg halda tað uttanfyri alt mark, tá samgongan viðger stórmál, sum hava týdning fyri tey veikastu í samfelagnum og bert nýtir ein dag til viðgerðina**

NIÐURSKURÐUR
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Tað er fallið leiðslunum í Landsfelag Pensjónista og Samtak fyri bróstið, at trý politisk mál, sum vóru til viðgerðar í Løgtinginum í gjár, ið raka pensjónistar og fyritíðarpensjónistar meint, ikki eru send til hoyringar hjá nøkrum parti, áðrenn tey eru løgd fram. Feløgini vísa á, at tað harafturat verður víkt frá øllum tíðarfreistum í Løgtinginum, so uppskotini kunna lýsast í morgin 12. desember.

- Greitt er, at við eini slíkari tíðarfreist, so eru stundir ikki at viðgera uppskotini og avleiðingarnar av teimum út í æsir, hóast hesi mál hava stóran týdning fyri pensjonistar, ið fáa stuðul til heilivág og fyri pensjonistar, og sum njóta gott av dagtilhaldunum. Pensjónistar og fyritíðarpensjónistar verða eisini fátækari í 2009 í mun til 2008, tí viðbøturnar verða einans javnaðar við trimum og ikki fýra prosentum. Skuldi pensjónin og fyrtíðarpensjónin staðið mát við stóra prísvøksturin í 2008, áttu tær í øllum føri at verðið javnaðar við seks prosentum, gera Landsfelag Pensjónista og Samtak vart við.

Feløgini halda, at arbeiðshátturin bæði hjá landsstýri og Løgtingi er ógvuliga ódámligur, og tað er ikki sørt av vanvirðing, ið samgongan vísir pensjónistum og fyritíðarpensjónistum við hesi viðferð. Eisini undrast feløgini á, at sparitiltøk landsstýrisins fyrst skulu raka teir veikastu bólkarnar í samfelagnum.

- Tað hevur verið stór framgongd í Føroyum seinastu árini, men tað eru verri enn so allir bólkar í samfelagnum, ið hava fingið lut í framgongdini. Tað er hugstoytt, at landsstýrið fyrst leggur eftir pensjónistum og fyritíðarpensjónistum við at skerja umsorganarabeiðið, almannapensjónir og almannaveitingarnar, skriva Landsfelag Pensjónista og Samtak

Fyri samlaða landsbúskapin er sparingin 10 mió. krónur. Hetta er ein lítil dropi í mun til ta samlaðu fíggjarlógina, men fyri tey fólk sparingin rakar, kann hetta hava stórar avleiðingar, halda feløgini.

Landsfelag Pensjónista og Samtak heita fyrst og fremst á landsstýrið um at taka hesi uppskotini aftur, og í øðrum lagi á Løgtingið um fella hesi uppskot.

Í sambandi við viðgerðina í Løgtinginum høvdu pensjónistar ætlanir um at møta upp í tingsalinum í stórum tali í dag til tess at gera vart við ónøgdina yvir lógaruppskotini.



*Landsfelag Pensjónista og Samtak heita á landsstýrið um at taka trý uppskot aftur, sum vóru til viðgerðar í tingini í gjár. Í øðrum lagi heita feløgini á Løgtingið um at fella uppskotini*

*Savnsmynd*

# Eik økir um rentuinntøkur






*Báðir teir stóru peningastovnarnir hava nú lækkað bæði inn- og útlánsrentur, men ikki í sama mun. Útlánsrenturnar eru í høvuðsheitum lækkaðar bara 0,25 prosent, meðan innlánsrenturnar lækka 0,75 prosent. Á henda hátt hava bæði Eik og Føroya Banki tryggjað sær munandi størri rentuinntøkurnar komandi tíðina*

*Savnsmyndir*

**Eins og Føroya Banki gjørdi í síðstu viku, lækkar Eik nú eisini renturnar, men hækkar samstundis rentumarginalin, ið er munurin millum innláns- og útlánsrenturnar. Hetta merkir størri inntøkur til bankan**

RENTUBROYTING
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Í kjalarvørrinum av rentulækkingini hjá Tjóðbankanum tann 4. desember lækkar Eik Banki nú flestu útlánsog innlánsrentur. Men eins og Føroya Banki longu gjørdi fyri nøkrum døgum síðani, brúkar Eik Banki samstundis møguleikan at vaksa um rentumunin millum innlán og útlán, og hetta merkir sjálvandi størri rentuinntøkur til bankan.

Flestu útlánsrenturnar lækka 0,25 prosentstig og flestu innlán lækka 0,75 prosentstig. Altso er í høvuðsheitum talan um at lækka renturnar á útláni eitt hálvt prosentstig minni enn á innlánum. Tað merkir, at sokallaði rentumarginalurin, sum er grundarlagið undir inntøkum bankans, veksur, og harvið vaksa rentuinntøkurnar hjá Eik á sama hátt, sum inntøkurnar hjá kappingarneytanum, Føroya Banka, eftir at hesin hevur gjørt tað sama.

Rentan á 1. veðrættarlánum hjá Eik kemur niður á 7,0 prosent um árið. Hóast rentan á 1. veðrættarlánum nú er niðri á 7,0 prosentum um árið, eru realkredittlánini frá Eik munandi bíligari. Til dømis er rentan á einum rentutillagingarláni, tí sonevnda RTL2-láninum – tað vil siga rentan, ið verður ásett aftur í desember 2010 – í løtuni beint omanfyri seks prosent um árið.

Tað merkir, at sokallaðu RTL2-lánini í løtuni eru knapt eitt prosentstig lægri enn rentan á teimum vanligu bankalánunum við 1. veðrætti, ið føroyskir bankar vanliga hava veitt. Eik Banki ger vart við, at fyri uttan at vera bíligari, eru realkredittlán eisini tryggari enn vanlig 1. veðrættarlán, tí rentan kann læsast fast í stutt ella long áramál. Harvið er lánarin vardur móti framtíðar rentubroytingum á einum óstøðugum marknaði, skrivar Eik Banki.